ÚT AT KOYRA

## 35 túsund uppsagnir



Ford umleggja og minka um rakstrarútreiðslurnar við umleið 8 milliardum krónum. 35.000 fólk verða søgd úr starvi í USA og Kanada, og 5 verksmiðjur lata aftur í USA. Árliga bilaframleiðslan skal skerjast frá 5,7 til 4,8 milliónir.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Samstarva um motorar



Fyri at minka um útreiðslurnar umhugsa Hyundai Motor Co. samstarv við Daimler Chrysler og Mitsubishi Motor Corp. um at gera ein sokallaðan "world engine", ið skal brúkast til eina millión bilar hjá øllum trimum verksmiðjunum.

*Kelda: Hyundai Bil Import A/S*

## Primera ársins bilur



Top Gear, ið vit kenna frá sendingunum í BBC, hava kosið Nissan Primera til "Car of the Year". Primera bleiv eisini kosin besti bilur í miðalklassanum

*Kelda: Top Gear*

# Rúsdrekka og heilivágur – vandamikil blanding í ferðsluni

FERÐSLUTRYGD

Blandingin av rúsdrekka og heilivági er ofta vandamikil, tí við hesum kann styrkin av hesum blandaða løgi fleirfaldast. Í fleiri førum hava bilførarar eisini tikið annað enn heilivág. Kanningar vísa at um bilførarin er millum 18 og 24 ár, og hann hevur meira enn 0,5 promillu í blóðinum, er vandin fyri at doyggja nógvar ferðir størri.




*Hesi tøl eru grundað á norskar kanningar. Sum tað sæst á myndini fær løgreglan bert hendur á 50 av teimum 8.000 bilførarunum sum koyra ávirkaðir*




*Rúsdrekka økir um vandan í ferðsluni. Hevur bilførarin meira enn 1,5 promillu í blóðinum, so økist deyðavandin 160 ferðir*

# VW Transporter við eplum koppaði umborð á Tróndi



*Ringur sjógvur var, og bilurin, ið var lastaður við eplum, datt á liðuna*



*Aðrir bilar umborð á Trónda hendan dagin vóru: Ein Ford 17 ella 20m, tveir Toyota Mark ll og ein Ford Taunus stationvognur*

**Í myndaárbókini, Árið ið fór 1976, vóru myndir av hesum VW Transporter, sum koppaði umborð á Trónda, fullur av eplum, á veg inn á Skálafjørðin**

GOMUL MYND
*Magnus Gunnarsson*

Seinast í marts mánaði í 1976 hendi eitt sjáldsamt óhapp umborð á bilferjuni Trónda, ið var á veg úr Havn inn á Skálafjørðin. So ringur sjógvur var, at ein av bilunum á dekkinum, ein VW Transporter lastbilur, lastaður við eplum, datt á liðina. Av tí at motorurin er aftan, undir lastini, er lastin lutfalsliga ovarlaga. Tá tyngdarpunktið er ovarlaga og bilurin væl lastaður, skal ikki so nogv til at eitt slíkt óhapp kann henda í ringum veðrið. Tíbetur varð eingin mannskaði.



3. - 5. mai í Ítróttarhøllini í Runavík

# Bústevnan
Hús & Innbúgv







*Staðið har:*

Bygging - Umbygging
Havaarbeiði - Umvæling
Køkar - Vindeygu
Hurðar - Fígging
Trygging - VHS
Hvítvørur - Møblar...

...og øll sum hava við hús & innbúgv at gera, hava møguleika at stilla út.

Lat ikki henda møguleikan gleppa tær av hondum. Ver við á bústevnuni Hús & Innbúgv.

Setið tykkum í samband við okkum!

HÚS & INNBÚGV
Postbox 169 • FO-620 Runavík
Tel 44 91 91 /45 63 98 Fax 44 86 35
Fartel 22 29 82 / 26 15 44
Email nhj@post.olivant.fo